

Fatih Birol, stjóri á altjóða orkustovninum IEA. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Gass og grøn orka vinna fram

**Jógvan Hugo Gardar**

24.11.2015 - 12:12

Oljan.fo

- Tann grøna orkan vinnur fram á heimsmarknaðinum, og tað er gott fyri øll, segði Fatih Birol á orkustevnuni sum Statoil og norska orkumálaráðið skipaðu fyri í Oslo. Hetta er tann tíggjunda ráðstevnan sum hevur verið. Talan er um orkutoppar bæði innan olju- og orkuvinnu og politikkarar.

Í hesum høpinum er Fatig Birol ein superstjørna. Hann er nýggjur stjóri á altjóða orkustovninum IEA, men hevur arbeitt fyri IEA í nógv ár.

Han var komin til Oslo at leggja fram árligu World Energy Outlook-frágreiðingina, bert eina knappa viku áðren klimatoppfundin í Paris.

- Gass kemur at hava stóran týdning tá vit skulu fáa kolnýtsluna niður, men gass er ikki einasta svarið, segði hann. Hann peikaði á at grøn orka fær meir og meir týdning, ikki minst í londum sum India og Kina.

Klimamálið hjá ST sigur at meðalhitin á jørðii ikki skal vera meir enn tvey stig heitari í 2100 enn hann var í 1850.

- Vit hava brúk fyri gassi fyri at fáa nýtsluna av kolið niður, men vit hava serliga brúk fyri meir grønari orku og orkan sum vit brúka má brúkast betri fyri at vit skulu kunnu koma á mál, segði Birol.

Av grønu orkukeldunum vísir Birol serliga á sól- og vindorku sum berandi grønar orkukeldur.